# Tað verður bíligari at fara á internetið

*Kappingin nærkast í hvørjum, og Føroya Tele liggur ikki á latu síðuni, meðan bíðað verður eftir, at onnur feløg fara at bjóða út uppringt internetsamband. Eftir summarferiuna fer fjarskiftisfyritøkan at bjóða fleiri ymisk sløg av internetsambandi út*

Rúnar Reistrup

At gjalda stórt stovningargjald fyri internet hald er helst farin tíð um ikki so leingi, og tað eru minuttprísir á 30 oyru um dagin og 15 oyru um kvøldið kanska eisini.

Internetsambandið í Føroyum er bíligari enn í fleiri av europeisku londunum á meginlandinum, men samanborið við lond sum Danmark, Noreg og Ísland liggur prísurin í Føroyum nakað hægri. Men hetta stendur helst fyri broyting.

Beinleiðis orsøkin er, at hørð kapping millum internetútbjóðarar eftir øllum at døma stendur fyri durum.

Kapping er longu á økjunum, eftir at fyritøkurnar Sp/f MET og Sp/f Teletænastan báðar hava fingið neyðugu fjarskiftisloyvini og hava samrátt seg fram til eina avtalu við Føroya Tele um at leiga seg inn á telefonkervið.

Men sum er, bjóða hesi feløg ikki vanligt uppringt internet samband. Talan er meira um samband, ið hóskar til fyritøkur, og tí hevur vanligi brúkarin ikki merkt so nógv til nakra kapping. Hetta broytist í teirri løtu ein fyritøka fer at bjóða internetsamband, ið hóskar vanliga brúkaranum, og tað fer eftir øllum at døma skjótt at henda.

**Meira fjøltáttaðir prísir**

Á Føroya Tele hava tey brynjað seg til hesa kapping við millum annað at útvega nýggja avrokningarskipan, sum ger tað møguligt at gera prísirnar fyri internetsamband meira fjøltáttaðar. Tað merkir at fleiri ymisk internethald við ymsikum minuttprísum og ymiskum mánaðargjaldi kunnu bjóðast út, og brúkarin kann so velja hvat honum passar best.

Men tað er ikki nóg mikið bara at geva brúkarunum møguleika at velja millum fleiri hald. Hesi hald mugu eisini vera kappingarfør í prísi.

Andras Róin, stjóri á Føroya Tele væntar, at tað fer at gerast neyðugt at lækka prísirnar á internetsambandi sum heild, tá kapping verður um viðskiftafólkini.

- Stovningargjaldið fer at minka og kanska enntá fella burtur, tá vit skulu kappast um at fáa viðskiftafólk til okkara. Viðvíkjandi minuttprísinum, so vænti eg eisini, at vit fara at verða trýstir til at lækka hann, sigur Andas Róin.

Føroya Tele hevur skyldu til at lata aðrar loyvishavandi útbjóðarar keypa seg inn á telefonkervið, um hesir ynskja tað, og fyritøkan hevur somuleiðis skyldu til at gera tað fyri ein prís, ið Føroya Tele, keyparin og Fjarskiftiseftirlitið meta vera sámuligan.

- Við tí prísinum, sum hinir útbjóðararnir kunnu keypa seg inn á kervið fyri meti eg, at teir væl kunnu fáa eina forrætning burturúr at selja internetsamband fyri lægri prís enn tað, sum vit kunnu bjóða í løtuni, og tað leggur sjálvsagt trýst á okkum um at fáa minuttkostnaðin niður, soleiðis at vit eisini kunnu geva teimum nýggju útbjóðarunum kapping, sigur stjórin á Føroya Tele, sum harafturat væntar at komandi útbjóðararnir eisini fara at leggja seg eftir at kappast á tænastuøkinum.

**Ikki danskar prísir**

Danmark er eitt av teimum grannalondunum, har internetsamband er sera bíligt í løtuni, men sambært stjóranum á Føroya Tele skulu vit ikki vænta at uppliva eins lágar prísir í Føroyum.

- Fyri tað fyrsta haldi eg at vit mugu síggja í eyguni, at reint geografiskt liggja vit soleiðis fyri, at tað er eitt sindur dýrari at veita internetsamband í Føroyum enn á meginlandinum. Harafturat kemur so, at tær fyritøkurnar, ið bjóða bíligt internetsamband út í Danmark, so sum Mobilix og Telia, koyra við stórum undirskoti, tí tær rætt og slætt dumpa prísirnar fyri at vinna sær viðskiftafólk.

Og stendur tað til Andras Róin fer hetta ikki at henda í Føroyum.

- Vit hava kanska kapital til at lækka prísirnar so nógv, at vit sláa kappingarneytarnar út eftir stuttari tíð, men tað hava vit ongan áhuga í, tí tað hevði helst rakt okkum sjálvi harðari aftur.

Men hóast Føroya Tele ikki ætlar sær at dumpa prísirnar, so fara føroyingar at njóta væl av kampanjutilboðum og lægri internetgjaldi sum heild, tá kapping um vanliga internetútbjóðaran um ikki so langa tíð gerst veruleiki.

- Vit ætla okkum at kappast upp á prís. Vit ætla ikki at lata øll viðskiftafólkini rýma til kappingarneytarnar, soleiðis at vit enda við bara at vera kervisveitarar hjá øðrum fyritøkum, ið sleppa at gera alt tað stuttliga, sigur Andras Róin, stjóri á Føroya Tele.

Δ



*Andrass Róin, stjóri á Føroya Tele*

# Internettænastur spríkja upp

*Mongdin av føroyskum internettænastum veksur støðugt, sum fleiri fáa eyguni upp fyri vinnumøguleikunum á netinum. Seinasta skotið á himlinum er virkisskráin www.gulu.fo*

Rúnar Reistrup

So hvørt sum fleiri brúkarar fáa atgongd til internetið, veksur møguleikin fyri at reka vinnu á sjálvum netinum. Í Føroyum hava einstaklingar og virkir rættiliga fingið eyguni upp fyri nýggja marknaðinum, og bara higartil í ár eru fleiri átøk farin í gongd, ið stíla ímóti at gera nýtslu av hesum.

Fyri bara nøkrum mánaðum síðan var www.olivant.fo einasti sokallaði „portalurin" á netinum, men síðan tá hevur gamla leitimaskinan Leitelment seg til ein rættiligan portal, eins og www.in.fo fyri stuttari tíð síðan kom á netið sum tann triðji føroyski portalurin.

Aðrar meira avmarkaðar føroyskar tænastur eru eisini komnar í hópatali, og seinasta skotið er virkisskráin www.gulu.fo hjá Føroya Tele og Menningarstovuni, sum stílar ímóti at hava skrásett umleið 2.200 virkir í skrá síni, tá hon alment byrjar 1. juli.

Sjálv skrásetingin er ókeypis fyri virkini, men harumframt ber til hjá virkjunum at keypa sær eina meira umfatandi skráseting. Til dømis ber til at fáa leinkju til heimasíðu ella e-post við í skrásetingina við at gjalda eyka fyri hetta.




**Útlitini góð**

Jens Pauli G. Nolsøe, er deildarleiðari á Teleforlagnum hjá Føroya Tele, ið hevur ábyrgdina av at reka og menna www.gulu.fo. Hann sigur, at møguleikar eru fyri, at tann íløgan, ið er løgd í tænastuna, er vunnin inn longu um eitt ár. Hvørjir framtíðarútlit tænastan hevur, er ilt at siga longu nú.

- Tað velst alt um hvussu tænastan verður brúkt og móttikin av brúkarunum, men enn vita vit einki um hvussu hon fer at verða vitjað, tí virkisskráin fer ikki rættiliga ígongd fyrr enn 1. juli, sigur Jens Pauli G. Nolsøe.

Umframt www.gulu.fo stendur Teleforlagið eisini fyri rakstrinum av www.nummar.fo og av Olivant portalinum. Virkisskráin og nummarveitarin eru greitt avmarkaðar tænastur, meðan portalurin helst skal vera so fjølbroyttur sum gjørligt.

Kapping er um brúkararnar millum teir tríggjar portalarnar, og tí ræður um at menna teir skjótt.

Ætlanin er at Olivant portalurin skal koma út í nýggjari útgávu komandi mánað, og tá er millum annað ætlanin at tað skal vera møguligt at síggja „Dag og Viku" hjá SvF. Í mars mánaði kom ein tíðindatænasta á Olivant, og síðan tá er talið á sokallaðum „hits" vaksið frá 8.000/9.000 til eini 14.000 „hit" um samdøgrið.

Nýggja virkisskráin hjá Føroya Tele og Menningarstovuni er neyvan tann seinasta stóra føroyska internettænastan. Graml er um fleiri aðrar ætlanir, sum helst fara at síggja dagsins ljós seinni í ár.



*Jóannes Dalsgaard, deildarstjóri á Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, tekur í móti Tom Stove, formanni í Shetland Islands Council ( Mynd: Jens Kristian Vang)*

# Hetlendsk vitjan

*Hetlendski løgmaðurin vitjar í hesum døgum í Føroyum eftir innbjóðing frá Anfinni Kallsberg, løgmanni. Í dag var hann millum annað og vitjaði Undirvðisingar- og Mentamálastýrið*

Edvard Joensen

Vit eiga at royna at fáa meira samstarv við hetlendingar, heldur løgmaður. Eitt øki, vit kundu samstarva um, er mentan og undirvísing. Og í gjár var hetlendsk sendinevnd og vitjaði Undirvísingar og Mentamálastýrið.

Formaðurin í hetlendska stjórnarráðnum, Shetland Islands Council, Tom Stove, vitjar í hesum døgum í Føroyum. Vitjanin er komin í lag eftir innbjóðing frá Anfinni Kallsberg, løgmanni, sum var á vitjan í Hetlandi í fjør.

Tom Stove kann metast at vera løgmaður í Hetlandi.

Í tíðindaskrivi sigur løgmansskrivstovan, at løgmaður væntar vitjanina at kunna styrkja mentanarligu og vinnuligu bondini millum Føroyar og Hetland. Vit hava nógv felags áhugamál. Eitt nú fiskivinnu og væntandi eina komandi oljuvinnu eisini.

Á vitjanini í Føroyum hevur Tom Stove við fylgi havt fundir við landsstýrismenn og ferðavinnuna. Eisini hava teir vitjað ymsar føroyskar fyritøkur. Teir hava millum annað vitjað Tórshavnar Havn og Undirvísingar- og Mentamálastýrið.

Tá løgmaður í fjør var í Hetlandi, vitjaði hann millum annað fiskivinnuskúlan í Scalloway, sum hann helt, at føroyingar áttu at lært eitt sindur av.

Anfinn Kallsberg, løgmaður sigur, at hetlendingar høvdu dugað sera væl at samskipa hendan skúlan við praktisku vinnuna.

Til dømis bar til á sama staði at fáa grundundirvísing í fleiri lørugreinum innan sjóvinnu, sum so vórðu specialiseraðar seinni.

# Ráðstevna um samamál

*Norðurlendska Ráðharraráðið skipar í heyst fyri ráðstevnu um samiskt mál. Ráðstevnan verður hildin í Karasjok í september*

Í døgunum 19.-22. september skipar Nordisk Ministerråd fyri ráðstevnu um samiskt mál. Stevnan verður hildin í Karasjok í Samalandi og er fyri fólk, sum hava áhuga fyri »ikki skandinavisku« málunum í Norðanlondum.

Stevnan verður nevnd »Samiskt í einum nýggjum túsundáraskeiði« og er partur av virkisskránni Nordmál.

Nordmål er virkisætlan fyri norðurlendskari málkunning, har eisini samiskt mál kemur undir.

Skráin stuðlar tiltøkum til tess at styrkja arbeiðið at skilja norðurlendsku grannamálini eins og arbeitt verður fyri at betra um kunnleikan fyri teimum sonevndu »ikki skandinavisku« málunum á Norðurkollinum.

Endamálið við ráðstevnuni er at geva fólki innlit í samiskt mál umframt mentan og fyrisiting. Ráðstevnan verður skipað við fyrilestrum.

Tilmelding til ráðstevnuna skal verða Nordisk Ministerråd í København í hendi í seinasta lagi 8, august. Meira kann fáast at vita frá Ráðharraráðnum, sum hevur telefon

0045 33 96 02 00

**ej**



*Har lítið fólk er til, noyðast tey fáu, sum eru, at gera alt. Poulina Eliasen á Syðradali roynir seg eisini sum havnarfúta, tá barsskor leggur at (Mynd: Jens Kristian Vang)*

# Minnisvarði á Syðradali

*Á Syðradali á Kalsoy verður minnisvarði yvir bygdarfólk, sum farin eru av vanlukku á sjógvi og landi, avdúkaður í næstum*

Edvard Joensen

Nú fær eisini Syðradalur á Kalsoynni ein minnisvarða yvir bygdarfólk, sum farin er av vanlukku av ymsum slag.

Arbeitt hevur verið við minnisvarðanum eina tíð, og nú stendur hann klárur beint norðan fyri bygdina.

Tað er minnisgrunnur Andreas Eliasen, sum fíggjar minnisvarðan.

Minnisvarðin verður avdúkaður leygardagin 8. juli klokkan 13.

Skipað verður fyri hátíðarhaldi á Syðradali, tá minnisvarðin verður avdúkaður, siga Poulina og Erik Eliasen, sum hava staðið fyri arbeiðinum at fáa minnisvarðan reistan. Skrá er løgd við røðum, sangi, tónleiki og so framvegis, siga tey í tíðindaskrivinum, sum sent er út.

Eisini verður skipað fyri ferðing til og úr Kalsoynni í hesum sambandi. Lýst verður við hesum seinni, siga fyrireikararnir.

Sagt verður í tíðindaskrivinum, at eftir sjálvt hátíðarhaldið norðuri við minnisvarðan standa hurðarnar á Syðradali opnar. Boðið verður ábit við smurdum breyði, te, kaffi og køkum.

Fyrireikararnir vóna at nógv fólk kemur til bygdar hendan dagin og ynskja øllum at vera hjartaliga vælkomin, siga tey bæði Poulina og Erik Eliasen á Syðradali á Kalsoy í tíðindaskrivinum.

PRÝÐISLUTIR
VIÐ MOTIVUM ÚR NORRØNU GUDALÆRUNI



ASKUR OG EMBLA

Anker Eli Petersen hevur designað eina spennandi røð av prýðislutum við motivum úr norrønu gudalæruni. Her eru 4 motiv - fleri eru at velja ímillum.

Eitt frálíkt gávuhugskot - til studentin, føðingardagsbarnið, konfirmantin...



ÓÐIN



NORNUR



YMIR OG EYÐHUMLA

3arin

SMS · Tel 353535 · Fax 353536
E-mail: tryarin@post.olivant.fo

SANSIR TEL 355 355